inni - trygt og ómaksleyst til hús

## Íbúðir, raðhús og vinnuhøli – undir Kongavarða, Argir

Her kanst tú vera við, tí enn eru nakrar íbúðir á 102 m² og á 131 m², nøkur vinnuhøli í stovuhædd á 130 m² og nøkur raðhús á 209 m² eftir til sølu. Nú kunnu øll keypa. Talan er uttan iva um bíligasta fermetraprís, tú yvirhøvur kanst byggja fyri í dag, so talan er óivað eisini um eina sera góða íløgu. Tú kanst velja millum ymisk gólv og ymisk snið og lit á køki. Set teg í samband við okkum og fá meira at vita.





### Tvíhús – Grønlandsvegur 66, Tórshavn

Bygd verða tvíhús í tveimum hæddum við kvisti stødd uml. veghædd 67m2 og loftshædd 58 m2. Húsini, sum eru tey vælkendu Suðuroyarhúsini (eins snið sum myndin), verða seld lyklaklár tvs. við køki og baðirúmsmøblum - tó uttan máling og tapet innan. Húsini verða málaði uttan (lit eftir ynski frá kundanum) og vindeyguni eru hvítmálað við sprossum. Í niðaru hædd er durur, gong, trappa til loftshæddina, baðirúm við brúsu, vásakøkur við hurð út í tún, køkur / borðsstova / stova við útgongd út á útigólv. Í ovaru hædd er gong, hjúnarúm, baðirúm og 2 kømur. Trý parkeringspláss verða til hvørt húsi. Er ynski um tað, er pláss fyri at gera garasju til hvørt húsið. Stutt til gongu oman í miðbýin, í skúla, dagstovn og til handils. Útsýni er oman yvir býin og út á Nólsoynna.



### Íbúð – Niðaragøta 4, Hoyvík

Stór íbúð í tveimum hæddum, búvídd 95 fermetrar. Byggiár: 2002. Íbúðin er innrættað við miðhædd og loft og ovastaloft til goymslu. Íbúðin er sera rúmlig og hevur hita í gólvinum í baðirúmi, bæði í erva og í neðra, í durinum og í vaskirúminum. Hvítvørinar í køkinum eru av merkinum "Gram". Íbúðin hevur fjarðhita og lága orkurokning og er í góðum standi - klár at flyta inn í. niðaru hædd er gong, vaskirúm / fýrrúm, stova / køkur, wc og goymslurúm. Í ovaru hædd er gongd, hjúnarrúm, klædnarúm, baðirúm og tvey kømur. Í búðin stendur í friðaligum umhvørvi við góðum parkeringsviðurskiftum, og vakurt og frítt útsýni er út á Nólsoynna og yvir Nólsoyarfjørð.



### Íbúð – undir Kongavarða, Argir

Frálíka íbúðin undir Kongavarða er 102 m² til støddar og harafturat er felagsøki, trappugongd og lyfta. Íbúðin, sum er í gerð, er sera snøgg, væl gjørd og úr besta tilfari. Hon er væntandi liðug síðst í 2008. Har er trappurúm / lyfta, inngongd, gongd / forstova / garderoba, baðirúm / vaskirúm, køkur, borðstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm við útgongd til svala og kamar. Íbúðin liggur í friðarligum, náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við góðum tilplantaðum felagsøki, spæliplássi, sparkivølli og góðum parkeringsøki. Íbúðin er á 3. hædd og hevur panoramaútsýni yvir alla Havnina, Nólsoynna og fjørðin. Prísuppskot: kr. 1.755.000,00



### Grundstykki – undir Borgarhálsi, Velbastaður

Ognin er eitt grundøkið á 770 fermetrar, sum liggur væl fyri við góðum atkomumøguleikum. Grundøkið verður í løtuni planera og gjørt byggiklárt. Grundøkið verður selt, um hóskandi boð fæst.



### Stór trøð – Norðuri í Sundum, Kollafjørður

Ognin er eitt stórt jarðarstykki / trøð innangarðs á uml. 10.520 fermetrar. Ognin, ið er væl egnað til grundstykki, liggur sera væl fyri í nátturuvøkrum og friðarligum umhvørvi við sera góðum útsýni og atgongd til veg. Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – undir Gráasteini 33, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum - niðara á 84,24m² og ovara á 63,72m² - í alt 147,96 m². Grundøkið er 475m². Byggiár: 1982. Húsini eru væl hildin í góðum standi. M.a. eru nýggj gólv, hurðar og vindeygu omandeftir í ovaru hædd og nýtt gólv í stovuni og í gongini. Í niðastu hædd er inngongd, hjallur, gongd / garderoba, baðirúm, bryggers, køkur / borðstova / alrúm, borðsstova / stova. Í erva er trappupallur / sjónvarpsstova / alrúm, hjúnarrúm við egnum baðirúmi, 2 kømur. Garður / urtagarður er runt húsini. Har er gott busssamband og stutt til skúlar og dagstovnar. Húsini standa nær býnum í vøkrum umhvørvi og hava sera gott útsýni oman yvir býin og út á fjørðin.



### Virkisbygningur - Víkarvegur 1, 690 Oyndarfjørður

Bygningurin er í 2 hæddum - hvør hæddin er uml: 125 fermetrar. Grundøkið er uml. 450 fermetrar. Byggiár. 1988. Bygningurin hevur verið brúktur til vinnuligt endamál. Húsini hava stoypta grund, eru kløðd við timbri og hava aluminiumstak. Í niðaru hædd er móttøka og stór høll. Í ovaru hædd er gongd, kantina, 2 goymslurúm, skiftirúm, 2 wc og kontór. Bygningurin stendur á kaiøkinum á Oyndarfjørður.
Prísuppskot: 1.000.000



### Tvíhús – Egholmstrøð 5, Tórshavn

Húsini eru eini tvíhús í 2 hæddum - samlað búvídd 120 fermetrar. Grundøkið er 300 femetrar. Byggiár: 1988. Húsini eru kløðd við timbur, hava trævindeygu og aluminiumstak. Í niðaru hædd er gongd, baðirúm, køkur, kamar, stova, vaskirúm / fýrrúm og útigólv. Í ovaru hædd er gongd, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur. Garður við runnun er runt húsini. Húsini standa sera væl fyri mitt í býnum, beint við handilsmiðstøð, og stutt er til alt. Prísuppskot: kr. 1.900.000,00.



### Sethús - Bótolvsvegur 11, Miðvágur

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml 196 fermetrar. Grundøkið er 443 fermetrar. Byggiár 1930-unum /1995. Húsini hava betong grund, træ klædning, træ vindeygu og aluminiumstak. Húsini blivu renoverað í 1995. Tá bleiv øll niðasta hæddin gjørd av nýggjum, stórur partur av ovastu hæddini og ein partur av miðhæddini. Harumframt er takið eisini skift. Í niðastu hæddini er gongd, 2 kømur, baðirúm, kjallararúm/ fýr/ vaskirúm og goymslurúm undir trappuni. Í miðhæddini er durur/ gongd, køkur og stova. Í ovastu hæddini er gongd, wc, 2 kømur og fleiri innbygd skáp. Urtagarður er niðanfyri húsini. Húsini hava gott útsýni.
Prísuppskot: 950.000



### Sethús – millum Gilja 70, Hoyvík

Húsini er eini væl umsitin sethús við íbúð og stórari garasju í kjallarinum. Húsini eru í trimum hæddum, kjallari og miðhædd á uml.109 m² hvør og loftshæddin er 87 m². Húsini eru bygd 1988 / 2006. Tá er íbúðin í kjallarinum og miðhædd alt gjørt av nýggjum. Húsini hava stoypta kjallarahædd, yvirtromin er úr rotfríðum timbri. Tekjan er takt við Icopal. Út frá stovuhæddini er ein stór altan, sum vendir rætt í mun til sólina. Í miðhæddini er gong, køkur, stova, baðirúm og stórt hjúnarrúm. Í ovastu hædd er eitt stórt rúm. Í niðastu hæddini er durur, gong, køkur, stova, kamar, baðirúm, stór garasja við inngongd beinleiðis inn í kjallaran og trappa upp á stovuhæddina. Húsini liggja frítt fyri, hava giring og urtagarð runt húsini. Dagstovnur og fótbóltsvøllur er beint yvirav og gott bussamband er oman í býin.



### Serstøk hús við frálíkum útsýni – Argjavegur 6, Argir

Serstøku húsini eru 2 hæddum á 193 m² - í alt 386 m². Grundøkið er heilar 1037 m². Uppruna byggiárið er 1970, men mest sum alt er gjørt av nýggjum innan so við og við, so húsini eru væl hildin og í góðum standi. Í neðra er inngongd, durur, gongd / hall, millumgongd / goymslurúm, baðirúm, stova / kamar, inngongd / gongd, fýrrúm, kamar, kjallararúm, garaga / goymslurúm. Í erva er uppgongd, køkur / alrúm / borðsstova, stova / hugnastova við eldstaði / brenniovni, gongd / arbeiðsrúm, baðirúm, hjúnarrúm við egnum baðirúmi við brúsu og gosbað, 2 stór kømur. Harafturat er stórur bilskúrur á 33 m², stórur garður / urtagarður uttanum. Framman fyri er innilokaður garður við útigólvi, grasplenu og runnum. 6 bilar kunnu standa í túninum og stórt p-pláss er við síðuna av. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum øki og hava eitt heilst einastandandi gott útsýni oman í bátahavnina, út á fjørð og inn yvir Havnina. Skúli, barnagarður, busssamband og handil er nær við. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

## Vit hava stóran eftirspurning eftir húsum. Hevur tú hug til at selja?
## – Vinaliga, set teg í samband við okkum.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin